AGA- & ETISKANEVNDIN

KÆRA 4/2026

FSF-skrivstovan upplýsir Aga- og etiskunevndini:	
Málsheitið: B68 kærir 07 Vestur fyri brúk av ólógligum leikara í 2. deild hjá monnum	
Deild: 2. deild menn	Hvør hevur reist málið: B68
Kapping: Landskapping	Nevndin móttikið kæru: 16. oktober 2026
Møguligt brot framt: 9. oktober 2026	Kærugjald goldið: Ja
Partshoyring: Ja	5 daga kærufreist hildin: Ja
Áheitan um munnliga viðgerð: Nei	Starvsnevndarummæli: Ongar viðmerkingar

Úrskurður

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at Janus Svabo Samuelsen var at rokna sum ólógligur leikari fyri 07 Vestur í dystinum móti B68 tann 9. oktober 2026. Tað var ikki loyvt leikaranum at flyta úr Meistaradeildini til 2. deild at leika dyst, tí niðurflytingin fór fram eftir, at fjórðseinasti dystur hjá 07 Vestur í lægri deildini var avgreiddur tann 19. september 2026.

At gera brúk av ólógligum leikara er brot á regluverkið hjá FSF. Fordømi eru um, at slík brot verða revsaði við, at felagið verður dømt at tapa dystin, har leikarin varð nýttur sum ólógligur leikari.

07 Vestur verður tí dømt at tapa dystin móti B68 í 2. deild hjá monnum, sum varð leiktur tann 9. oktober 2026, við málmuninum 0-3 sambært grein 6, bókstav g í 3. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Kæran, partshoyringin og møguligt starvsnevndarummæli

Í kæruni førir B68 fram, at 07 Vestur hevur brúkt Janus Svabo Samuelsen sum ólógligan leikara í dystinum móti B68 tann 9. oktober 2026. B68 vísir á, at Janus Svabo Samuelsen ikki kemur undir undantakið fyri leikarar undir 21 ár og hevur leikt fleiri enn tríggjar landskappingardystir í hægri deild í kappingarárinum. Sambært B68 hevði hann tí ikki rætt til at leika nevnda dyst, sum var triðseinasti dysturin hjá 07 Vestur í 2. deild hjá monnum.

07 Vestur hevur í partshoyringini ført fram, at Janus Svabo Samuelsen var lógligur leikari í dystinum. Felagið vísir á, at fjórðseinasti dysturin hjá 07 Vestur í 2. deild hjá monnum var tann 19. september 2026, sama dag sum Janus Svabo Samuelsen varð skiftur inn í dysti hjá Meistaradeildarliðnum hjá felagnum.

07 Vestur førir víðari fram, at dysturin móti FC Suðuroy tann 19. september 2026 eigur at telja við sum fjórðseinasti dysturin, hóast 07 Vestur ikki møtti til dystin og varð skrásett at hava tapt uttan at spæla. Felagið vísir í hesum sambandi á, at dysturin er skrásettur sum ein taptur dystur í kappingini.

Til stuðuls fyri sínum sjónarmiði vísir 07 Vestur eisini til eina ávísa orðing í vegleiðingini undir „Ofta settir spurningar“ á heimasíðu FSF’s um avmarkingar í niðurflyting av spælarum í endanum av kappingini.

AGA- & ETISKANEVNDIN

Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Aga- og etiskanevndin hevur sambært grein 2, 3 og 5 í Aga- og etiskureglugerðini hjá FSF heimild at viðgera og taka avgerð í hesum máli.

Fakta í málinum

Skrivstovan hjá FSF hevur upplýst málið og eftirkannað skrásetingarnar á dómaraseðlunum. Staðfestast kann, at Janus Svabo Samuelsen leikti við 2. deildarliðnum hjá 07 Vestur móti B68 tann 9. oktober 2026. Hetta var triðseinasti dystur hjá 07 Vestur í 2. deild hjá monnum í kappingarárinum.

Skivstovan hjá FSF hevur upplýst, at Janus Svabo Samuelsen leikti við Meistaradeildarliðnum hjá 07 Vestur tann 19. september 2026, tá ið hann varð skiftur inn í 84. Minutti. Eftir tí upplýsta leikti hann ikki í hægri deild eftir hendan dagin.

Sama dag, tann 19. september 2026, skuldi 07 Vestur sambært kappingarskránni leika fjórðseinasta dystin hjá liðnum í 2. deild hjá monnum móti FC Suðuroy. 07 Vestur møtti ikki til dystin, og dysturin varð tí ikki leiktur. Dysturin er skrásettur sum eitt tap hjá 07 Vestur við málmuninum 0-3. Úrslitið telur við á stigatalvuni í 2. deild hjá monnum.

Lógarverkið

Kappingarreglurnar áseta í grein 9, at leikari kann ikki flyta frá hægri til lægri deild eftir at fjórðseinasti dystur er leiktur í lægri deildini í kappingarárinum.

Hetta umfatar ikki leikarar, sum koma undir grein 8, stk. 3. Tó er loyvt leikara, sum í kappingarárinum hevur leikt í mesta lagi 3 landskappingardystir í hægri deildini, at flyta niður í lægri deildina í hesum dystum samsvarandi ásetingunum í grein 8.

Sambært grein 6 í Aga- og etiskureglugerðini kunnu persónar og feløg verða dømd agarevsing fyri brot á fótbóltsregluverkið.

Staðfestingar, metingar og niðurstøða

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at Janus Svabo Samuelsen var at rokna sum ólógligur leikari fyri 07 Vestur í dystinum móti B68 tann 9. oktober 2026. Tað var ikki loyvt leikaranum at flyta úr Meistaradeildini til 2. deild at leika dyst, tí hetta hendi eftir, at fjórðseinasti dystur í lægri deildini var avgreiddur tann 19. september 2026.

Fjórðseinasti dysturin hjá 07 Vestur í 2. deild hjá monnum var sambært kappingarskránni dysturin móti FC Suðuroy tann 19. september 2026. Dysturin varð ikki leiktur á vøllinum, men 07 Vestur varð dømt at tapa hann við málmuninum 0-3, tí liðið ikki møtti til dystin.

Úrslitið av dystinum telur við á stigatalvuni og í kappingini annars. Nevndin metir tí, at dysturin í hesum høpi skal roknast sum avgreiddur og telja við, tá ið staðfest verður, nær fjórðseinasti dysturin hjá 07 Vestur í 2. deild hjá monnum var. Eftir nevndarinnar meting skal dysturin sostatt telja við í uppgerðini eftir grein 9, hóast hann varð avgjørdur uttan at verða leiktur.

Upplýst er víðari, at Janus Svabo Samuelsen sama dag tann 19. september 2026 hevur leikt í hægri deild, tvs. við Meistaradeildarliðnum hjá 07 Vestur, har hann varð skiftur inn sum eykaleikari í 84. minutti av dystinum.

Upplýst er at Janus Svabo Samuelsen flytur niður í lægri deild at leika dyst tann 9. oktober 2026 við 2. deildarliðnum hjá 07 Vestur, sum er triðseinasti dystur hjá 07 Vestur í 2. deild.

Fyrsti setningur í grein 9 í Kappingarreglunum fyri fótbólt ásetur, at leikari kann ikki flyta frá hægri til lægri deild eftir at fjórðseinasti dystur er leiktur í lægri deildini í kappingarárinum. Leikarin kemur ikki undir nakað av undantøkunum, sum eru ásett í somu grein 9.

Í sambandi við tulkingina av grein 9 hevur nevndin eisini viðgjørt avgerðina í kæru 6/2025 og ta vegleiðing á heimasíðu FSF's, sum 07 Vestur vísir til í sínum hoyringsskrivi.

Í kæru 6/2025 varð ein leikari hjá ÍF mettur at vera ólógligur til triðseinasta dystin hjá felagnum í 2. deild, eftir at hann hevði leikt í hægri deild sama dag, sum fjórðseinasti dysturin hjá felagnum í 2. deild varð leiktur. Avgerðin stuðlar sostatt teirri tulking, at ein leikari ikki kann flyta niður at leika teir tríggjar síðstu dystirar í lægri deild, tá ið seinasti dystur hansara í hægri deild varð leiktur sama leikdag sum fjórðseinasti dysturin í lægri deild, uttan so at hann kemur undir eitt av undantøkunum í grein 9.

07 Vestur hevur í sínum hoyringsskrivi víst til eina ávísa orðing í vegleiðingini undir „Ofta settir spurningar" á heimasíðu FSF's til henda spurningin, "Eru serligar avmarkingar í niðurflyting av spælarum í endanum av kappingini?" Aftaná vegleiðing um at tað ikki ber til at flyta spælarar niður frá hægri til lægri deild eftir at fjórðseinasti dysturin er spældur og tey tvey undantøkini til hesa reglur, endar vegleiðingin við hesum orðum: "Er talan um spælara, sum spældi sín seinasta dyst í hægru deildini sama leikdag, ella áðrenn lægra deildin spældi sín fjórðseinasta dyst, verður hesin ikki fevndur av reglunum." FSF-vegleiðingin er sambært heimasíðuni seinast dagførd 15. mai 2023.

Eftir tí upplýsta leikti Janus Svabo Samuelsen ikki í hægri deild eftir – tað vil siga aftaná - tann 19. september 2026, men hinvegin flutti leikarin heldur ikki niður at leika við 2. deild, fyrr enn í triðjaseinasta dysti í landskappingini fyri lægru deildina.

Nevndin staðfestir tí, at seinasti setningurin í vegleiðingini hjá FSF ikki fremur greidleika um tulking av grein 9, soleiðis sum hon eitt nú er løgd til grund í kæru 6/2025. Orðingin í grein 9 greiðir heldur ikki beinleiðis frá týdninginum av luttøku í hægri deild sama leikdag sum fjórðseinasti dysturin í lægri deild. Hetta er óheppið og kann skapa óvissu hjá feløgunum um, hvør rættarstøðan er og hvussu tey skulu bera seg at. Í kæru 6/2025 varð ikki beinleiðis tikin støða til týdningin av hesi vegleiðing.

Eftir eina samlaða meting heldur nevndin tó fast við tulkingina í kæru 6/2025. Nevndin leggur dent á, at avmarkingin í grein 9 knýtir seg at niðurflytingini til lægri deild eftir fjórðseinasta dystin. Nevndin tulkar grein 9 soleiðis, at ein leikari, sum hevur leikt í hægri deild sama leikdag sum fjórðseinasti dysturin í lægri deild, ikki kann flyta niður at leika teir tríggjar síðstu dystirnar í lægri deild, uttan so at hann kemur undir eitt av undantøkunum í grein 9. Hetta er eftir nevndarinnar meting eisini galdandi, hóast leikarin ikki hevur leikt í hægri deild eftir henda leikdag.

AGA- & ETISKANEVNDIN

Við støði í omanfyristandandi metir nevndin, at Janus Svabo Samuelsen í dystinum móti B68 tann 9. oktober 2026 varð fluttur úr hægri til lægri deild eftir, at fjórðseinasti dysturin hjá 07 Vestur í 2. deild hjá monnum var avgreiddur. Eftir tí upplýsta kemur hann ikki undir nakað av undantøkunum í grein 9. Hann var tí ólógligur leikari í dystinum, og 07 Vestur hevur við at nýta hann brotið grein 9 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Fleiri fordømi eru um, at feløg eru dømd at tapa dyst við málmuninum 0-3 fyri brúk av ólógligum leikarum. Aga- og etiskanevndin avgerð tí, at 07 Vestur verður dømt at tapa dystin móti B68 í 2. deild hjá monnum, leiktur tann 9. oktober 2026, við málmuninum 0-3 fyri brúk av ólógligum leikara.

Tapið við málmuninum 0-3 er ásett við heimild í grein 6, bókstav g í 3. reglubroti í Aga- og etiskureglugerðini og samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Kæruvegleiðing

Sambært grein 10, litra f í Aga- og etiskureglugerðini kann avgerðin um at døma 07 Vestur at tapa dystin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar eftir, at úrskurðurin er móttikin.

Staður, dagfesting og undirskrift:

Tórshavn 21. oktober 2026

Eli Thorsteinsson

Eli Thorsteinsson
Formaður

Í Aga- og etiskunevndini eru:

- Eli Thorsteinsson, formaður
- Ken Nónklett, næstformaður
- Anni á Hædd, løgfrøðingur
- Jóhan Troest Davidsen, løgfrøðingur
- Birita Sandberg Samuelsen, løgfrøðingur (hevur ikki tikið lut í viðgerðini)